Sosialurin
# VARPIÐ
F R Í G G J A D A G U R 0 7 . o k t o b e r 2 0 0 5



**Lyftið - The Pledge**
Politimaðurin Jerry Black, úr einum lítlum býi í Nevada, ger seg til reiðar til at fara á eftirløn. Men stutt fyri pensiónsdegnum verður ein átta ára gomul genta dripin, og Jerry fær uppgávuna at geva foreldrunum tey tungu deyðsboðini. Hann gevur tí knústu mammuni lyftið um, at hann skal fanga drápsmannin. Spenningsfilmur frá 2001 við Jack Nicholsen, leikstjórn: Sean Penn.
**Fríggjadag 7. kl. 20.30**



**Tey skrivaðu søgu (1:9)**
Í hesi røðini prátar Steffen Kretz við tíggju av teimum mætastu politisku leiðarunum í heiminum. Tíggju menn og ein kvinna - harímillum leiðarin av Libia Muhammar Gaddafi og amerikanska Madeleine Albright - hava við avgerðum sínum sett síni fingramerkir á heimssøguna. Í fyrstu sendingini tosar Kretz við libiska einaræðisharran í einum beduin-teltið í Tripoli.
**Sunnudag 9. kl. 21.00**



**Fótbóltur: Ísrael-Føroyar**
Seinasti landsdysturin hjá føroyska landsliðnum í HM-undankappingini í fótbólti verður spældur í Tel Aviv. Hetta verður eisini seinasti landsdysturin við Henrik Larsen, sum landsliðsvenjara. Og samstundis verður tað eisini seinasti møguleikin hjá landsliðnum at vinna sær fleiri enn tað eina stigið, sum landsliðið higartil hevur fingið í undankappingini
**Leygardag 8. kl. 18.55**

Televarpið
Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**